


# Leiðari til Dagstovnin á Argjum

**Søkt verður eftir leiðara til Dagstovnin á Argjum at byrja 1. oktober 2010 ella eftir nærri avtalu**

Dagstovnurin er sjálvsognarstovnur stjórnaður av eini fimm manna nevnd, men verður kommunalur stovnur 1. januar 2011 at rokna. Okkum tørvar ein leiðara við áræði og sum sær stórar avbjóðingar í hesi tilgongd.

Stovnurin er skipaður við 80 børnum í vøggustovu, barnagarði og forskúlabólki.

Aðalmálið hjá stovninum er at skapa karmar fyri at børnini fáa mennandi og avbjóðandi umstøður at vaksa upp í, har tey læra ábyrgd í felagsskapi og mennast í treysti til sín sjálvs.

Sum leiðari hevur tú ábyrgd av tí námsfrøðiliga arbeiðinum, trivnaðinum hjá bæði starvsfólkum og børnum, umframt dagligu umsitingina á stovninum.

**Vit leggja dent á**

- at skapa opinleika mótvegis foreldrum, starvsfólkum og børnum
- at starvsfólkini menna seg fakliga
- at geva øllum ábyrgd
- at sýna virðing og skapa trivnað
- at starvsfólkini fáa avbjóðingar
- at byggja á spælið, bæði inni og úti
- at tú hevur hugsjónir um virksemið á einum stovni, ið rúmar bæði vøggustovu, barnagarðs- og børnum í forskúlabólki

**Vit bjóða tær**

- starv við ávirkan og avbjóðing
- starv, ið krevur álit og sjálvstøðugt arbeiði
- starv, har tú nýtir dygdir og mennist
- ein stovn við sterkum samleika og í eini spennandi menning

**Tú bjóðar okkum**

- námsfrøðiliga útbúgving
- leiðsluroyndir og møguliga leiðsluútbúgving ella eftirútbúgving
- dirvi og visiónir
- fakliga vitan
- samskiftisevni
- framfýsni og hug at halda fram við søgu og menning stovnsins
- virðing fyri ymiskleika
- hollan kunnleika til teldu
- kunnleika til roknskap

**Setanartreytir**

Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Katrin Petersen 302010 / 214032 ella Sølvu Heinesen, næstformann í nevndini telefon 506725.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 30. august 2010** og stílast til:

Dagstovnurin á Argjum
c/o Tórshavnar kommuna
Vaglið 1
100 Tórshavn
Att.: Katrin Petersen

SENDISTOVAN

HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS

# Kommunulæknastørv í Føroyum 2010

Kommunulæknastørv í Suðurstreymoyar-, Suðuroyar Norðara-, Runavíkar-Skála-, Fuglafjarða- og Norðoya Læknadømi undir Heilsumálaráðnum eru leys at søkja, lýsing er send faktíðarriti í Danmark www.ugeskrift.dk og er eisini løgd á heimasíðuna hjá Heilsumálaráðnum.

Umsóknarfreistin er 16. august 2010.

***Nærri fæst at vita um størvini við at fara inn á heimasíðu okkara: www.hmr.fo, har nágreiniliga lýsingin stendur.***

Sosialurin 341800

Eirargarður 2 · 100 Tórshavn · tel 30 40 50 · fax 35 40 45 · hmr@hmr.fo · www.hmr.fo

# Starvsfólk til Miklagarð

Vit sóknast eftir røskum fólki at arbeiða fulla tíð.

**Vit vænta av tær:**

- At tú ert skilagóð/ur og megnar at hava nógvar bóltar í luftini í senn
- At tú ert nærløgd/lagdur, ert røkin og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- At tú ert ágrýtin og trívist við at hava nógv jørn í eldinum

**Um hetta er nakað fyri teg, send so eina umsókn til:**

Carsten Rodenberg
crt@sms.fo

MIKLAGARÐUR